## Týskland vann á Serbia

Týskarar spældu venjingardyst ímóti Serbia á Schalke-Arena í Gelchenkirchen um vikuskiftið. Úrslitið var 2-1 til Týskland, hálvleiksstøðan var 1-0 til Serbia. Basko Jankovic legði Serbia á odda eftir 18 minuttirs spæl. Síðsta korterið vaknaði Týskland veruliga. Oliver Neuville javnaði til 1-1 í 74. minutti, og í 82. minutti skoraði liðskiparin, Michael Ballack til 2-1. Estland, sum Føroyar skal spæla ímóti mikukvøldið tapti 1-0 ímóti Litava í Baltic Cup kappingini, sum er ein kapping millum Estland, Letland og Litava. Sigursmálið hjá Litava fall í 87. minutti, og var tað Valerijus Mizigurskis, sum skoraði fyri Litava.



## Svøríki tapti ímóti Ukraina

Svøríki tapti 1-0 ímóti Ukraina um vikuskiftið. Svøríki hevur tikið lut í 12 EM og HM-endaspølum áður, og svenskarar hava ongantíð áður tapt tann síðsta venjingardystin áðrenn eitt endaspæl. Nú Svøríki skal til sítt 13. endaspæl koppaði hendan stolta siðvenjan. Málið hjá Ukraina skeyt Sergei Nazarenko í 87. minutti. Svensku áskoðarnir vóru alt enn nøgdir við, at Svøríki tapti síðsta venjingardystin áðrenn EM-endaspælið. Danmark leikti á útivølli ímóti Póllandi, og eins og hóskvøldið ímóti Hollandi fekk Danmark aftur ein 1-1 javnleik. Martin Vingaard legði Danmark á odda í 28. minutti, Jacek Krzynowek javnaði beint áðrenn steðgin. Pólland brendi eitt brotsspark í 1. hálvleiki. Holland vann á heimavølli 2-0 á Wales, eftir hálvleiksstøðuna 1-0. Arjen Robben og Wesley Sneijder skutu málini hjá Hollandi.

## HB dømt at tapa

**VB/Sumba hevur fingið viðhald í kæru um at næstbesta liðið hjá HB hevur nýtt ólógligan leikara. Dysturin millum liðini endaði upprunaliga 3-3, men nú er HB dømt at tapa dystin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað kann kosta dýrt at nýta ólógligar leikarar í føroyskum fótbólti. Hetta hevur nú kostað næst besta HB-liðnum eitt stig, tí liðið nýtti Hendrik Rubeksen á vøllinum í 1. deildardystinum ímóti VB/Sumba hin 10. mai í ár. Fýra dagar undan hesum hevði hann spælt við Formula-liðnum hjá HB móti Víkingini, og hann hevði ikki lokið reglurnar um at leypa dyst um, áðrenn hann spældi við eykaliðnum hjá HB.

Ivaleyst er her talan um misskiljing hjá HB. Sama dystardag, sum eykamenninir spældu móti VB/Sumba, spældi besta HB-liðið hálvfinalu í kappingini um Løgmanssteypið. Men reglurnar siga greitt, at talan skal verða um landskappingardyst, sum spælari skal sita yvir, áðrenn flytast kann til lægri deild.

Dysturin endaði upprunaliga 3-3, men HB er nú dømt at tapa dystin við støðuni 0-0.

Talan var annars um ein drúgvan hósdag hjá Aganevndini. Umframt kæruna frá VB/Sumba skuldi nevndin eisini taka støðu í tveimum øðrum málum. 2. deild hjá B36 varð dømd at tapa dyst móti TB vegna nýtslu av ólógligum spælara, og í somu deild varð 07 Vestur dømt at tapa dyst móti MB, tí felagið nýtti spælara, sum av røttum var leikbannaður.

# Janus tekur seg fram

**Janus Jakobsen setti enn einaferð persónligt met í spjótkasti, tá Hvirlan skipaði fyri kastikapping um vikuskiftið**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sunnudagin skipaði Hvirlan fyri kastikapping. Enn er tað kastivøllurin við Eystur-skúlan, sum er karmur um hesa, og vóru fýra luttakarar við í kappingini.

Millum hesar var Rógvi Højgaard, og var hetta fyrsta kapping hansara, síðani hann fyri tveimum mánaðum síðani meiddi sær armin. Tað bar eisini við sær, at Rógvi var sera varin, og kastaði hann einans tríggjar ferðir, áðrenn hann valdi at gevast.

Hóast drúgva steðgin frá spjótkastinum, so kastaði Rógvi 52,58 metrar, sum er eitt rættilgia gott úrslit. Ungi Janus Jakobsen bøtti um sítt einans tríggjar vikur gamla persónliga met tá hann í síðsta kastinum fekk spjótið út á 44,85 metrar.

Í hamarkast vísti Randi at hon aftur er við at stabilisera teknikkin eftir nakrar vikur av meira óstøðugum úrslitum. Hon kastaði hamaran út á 35.77 m, sum er besta úrslit síðan 30. mars í ár, tá hon setti verandi felagsmetið, ið er 36.95 m. Heri betraði um felagsmetið við nøkrum centimetrum tá hann kastaði hamaran út á 44.97.



*Tað er í spjótkasti, at Randi Kúrberg hevur gjørt mest um seg, men seinastu tíðina hevur hon eisini tikið seg nógv fram í hamarkasti*

Mynd: www.hvirlan.fo

### Úrslitini

**Spjótkast**

| Havn | kast | met |
|---|---|---|
| Rógvi Højgaard | 52,58 | Felagsmet |
| Janus Jakobsen | 44,85 | Persónligt met |
| Randi Kúrberg | 30,08 | |

**Klingruvarp**

| | | |
|---|---|---|
| Heri Ziska | 41,11 | |
| Rógvi Højgaard | 29,63 | |
| Janus Jakobsen | 20,89 | Persónligt met |

**Sleggjuvarp**

| | | |
|---|---|---|
| Heri Ziska | 44,97 | Felagsmeg |
| Randi Kúrberg | 35,77 | |
| Rógvi Højgaard | 29,77 | |
| Janus Jakobsen | 19,65 | |

# Todi fær kapping

**Eitt annað fótbóltsfelag enn FCA sigur seg ætla sær á Amager at vera lokala og siðbundna valið í staðin fyri tað føroyska og privata hjá Toda**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ætlanin hjá Toda Jónsson um at savna øll fótbóltsfeløgini á Amager í eitt lið, sum innan alt ov rúma tíð skal spæla í superliguni, sær ikki út til at gerast til treytaleysan veruleika.

Tað hevur eydnast at savna fleiri av feløgunum í FC Amager, men ikki øll, og nú ætla onnur feløg á Amager at ganga saman um felag, sum skal hava annan heimavøll enn FCA, og sum innan rúma tíð ætlast at spæla í næstbestu deildini hjá monnum og kvinnum.

Tað eru Tårnby Boldklub og AB 70, sum eru feløgini, og heikmavøllurin verður á Tårnby Stadion. Ætlanin er, at felagið skal verða veruleiki í september í ár.

Fyrireikararnir dylja ikki, at talan er um ætlan, sum skal síggjast sum andsøgn til FC Amager og ætlanirnar hjá Toda Jónsson og øðrum:

- Hetta felagið skal verða alternativ til FC Amager. Tað felagið er grundað á føroyskar íløgur og privatar íleggjarar. Tað er ein verkætlan, sum hvørki Tårnby Boldklub ella AB 70 síggja at vera relevana í menningini av fótbóltinum á Amager. Vit ætla at syrgja fyri karmum fyri lokalum og nationalum íleggjarum, ið kenna seg aftur í virðunum, sum Tårnby Boldklub og Amager Boldklub af 1970 altíð hava staðið fyri, verður sagt í tíðindaskrivi.

Aftanfyri Toda Jónsson og FC Amager eru fýra fótbóltsfeløg á Amager: Fremad Amager, Kløvermarkens Forenede Boldklubber, Dragør Boldklub og Amager Fodbold Forening. Fomliga leggja hesi feløgini saman í FC Amager 1. juli í ár.